## Óheppin ferja

Ferjan „Atlantic Traveller“, sum siglir millum Fanmark og Noreg, hevur verið óheppin í summar. Herfyri lá skipið við bryggju í eina lítla viku, eftir at tað hevði siglt á ein mola í innsiglingini í Hanstholm, og í síðstu viku fekk tað tekniskar trupulleikar, sum órógvaðu frítíðina hjá 3.000 fólkum, skrivar Bergens Tidende. Í hesari vikuni var skipið aftur seinkað og noyddist at avlýsa ein túr. Hetta hevur verið trupult, sigur reiðaríið Fjordline.



## Gull í Grønlandi

Grønlendska felagið Nunaminerals A/S hevur góðar vónir um, at tað fer at loysa seg at útvinna gull á leiðini við Qussuk. Ein tyrla, sum er serliga útgjørd til slíkar kanningar, hevur flogið uppi yvir økinum, og hon hevur staðfest, at har er gull í jørðini, og at tað enntá sæst úr erva. Ole Christiansen, stjóri í Nunaminerals A/S, sigur við útvarpið í Nuuk, at útlitini eru góð, og at ætlanin er at fara undir kjarnuboringar longu í næsta mánað.

# Burturflytingarlið ger um seg

**Í síðstu viku bleiv ein tvey ára gomul genta knappliga burtur í einum handli í Gentofte í Danmark. Handilsvaktirnir funnu hana á einum WC, har tveir menn vóru í ferð við at klippa hárið av henni**

BURTURFLYTING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í kjalarvørrinum av burturflytingini av ensku gentuni Madelaine eru fólk vorðin nógv meiri ansin, og hava nógv meiri eyguni eftir børnum sínum. Og at hetta er neyðugt, gjørdist sjón fyri søgn hjá einari ungari mammu í Gentofte.

Hon og ein vinkona vóru farin inn í stóra handilin Ikea í Gentofte, tá mamman knappliga varnast, at dótturin er burtur. Eitt lítið bil leitaðu eyguni burtur frá dóttrini, og tað var nóg mikið.

Tær báðar boðaðu frá beinanvegin til informatiónina, og lukkutíð hevur handilin eina skipan sum ger tað møguligt, at læsa hurðarnar alt fyri eitt. Og hetta var sjálvandi gjørt.

Leitað var um allan handilin, og at enda komu handilsvaktirnir fram á lítlu gentuna inni á einum WC, har tveir mans vóru í holt við at klippa hárið av hesi lítlu. Menninir, sum søgdust vera pólendingar, vóru beinanvegin handtiknir.

Løgreglan arbeiðir við at rekja upp ein størri burturflytingarring, og heitti tí á mammuna og vinkonuna um ikki at fara í miðlarnar við hesum. Í Ekstrablaðnum stendur at lesa um hetta undir heitinum »vandrehistorier«. Men at hendingin er farin fram, sum her sagt frá, er váttað fyri Sosialinum av føroyskari mammu, hvørs dóttir starvast saman við ommuni hjá tvey ára gomlu gentuni, ið varð burturflutt.

Føroyska mamman sigur, at omman, dóttir hennara og allir starvsfelagar teirra eru fullkomiliga skelkað, og omman er líkaglað við, um løgreglan vil halda hetta loyniligt orsakað av kanningararbeiðinum. »Eg tosi um tað, tí eg vil ávara onnur, so tey ikki koma í líknandi støðu«, verður omman endurgivin fyri at siga.

Sosialurin kennir navnið á starvsfelaganum hjá hesi ommuni, men verður tað nevnt, kann tað koma henni í trupulleikar við løgregluna, og verður navnið tí hildi loynt.



*Sjálvt í Danmark kunnu tey ikki kenna seg trygg móti brotsmonnum, sum liva av at burturflyta børn fyri síðani at selja tey til pør, ið sjálvi ikki kunnu fáa børn*

*Tilvildarlig mynd*

# Kringvarpið blandar seg ikki – enn




**Vit arbeiða við at útbyggja okkara egnu heimasíðu við netvarping, men í løtuni eru ongar ætlanir at skapa eina nýggja »MySpace«-konsept í kringvarpinum, sigur Jógvan Jespersen, stjóri**

VALSTRÍÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Føroysku politisku flokkarnir ætla at brynja seg innan nýggja miðilin, alnetið, til komandi løgtingsval, sum verður í seinasta lagi um 176 dagar. Alneitið sum miðil er ein kappingarneyti hjá verandi traditionellu miðlunum, bløðunum, útvarpi og sjónvarpi. Serliga hjá seinnu nevndu.

Men kringvarpið hevur í løtuni ongar ætlanir at skapa eina nýggja heimasíðu a-la MySpace ella YouTube, og fylgja tí ikki slagorðinum: »If you can't beat them, join them«.



*Kringvarpið hevur í løtuni ongar ætlanir um eitt MySpace-konsept, sigur Jógvan Jespersen, kringvarpsstjóri.*

Hinvegin ætlar ÚF heldur at taka kappingina upp, skilt á tann hátt, at teir fara at gera nógv meiri við sína egnu heimasíðu.

- Vit hava eitt stórt potentiali, sum vit ikki hava brúkt enn. Og vit arbeiða støðugt at betra um tilboðið til okkara kundar við livandi myndum og ljóði á alnetinum, sigur Jógvan Jespersen, stjóri í Kringvarpi Føroya.

Hann vísir á, at oyggjaleikirnir í so máta vóru ein forleypari til hetta, eitt slag av royndarvirksemi.

Jógvan Jespersen sigur eisini, at heimasíðan hjá kringvarpinum í løtuni liggur sum nummar trý á yvirlitinum hjá Gallup yvir vitjaðar heimasíður. Samstundis er henda heimasíðan hin einasta, sum ikki er kommersiell, tí teir hava ikki loyvi at hava lýsingar á sínari heimasíðu.

Sum sagt so hevur kringvarpið í løtuni ongar ætlanir, ið hella móti einum MySpace-konsepti, tað hava tey als ikki tosað um, sigur Jógvan Jespersen. Hinvegin ætla teir sum nevnt at útbyggja verandi heimasíðu.

- Tað hevði verið ynskiligt, at kunna bjóða kundum okkara atgongd til søvnini hjá kringvarpinum. Men tað kostar sum kunnugt nógvan pening at digitalisera tey, og tað er ein fortreyt fyri, at kunna bjóða hesa tænastuna, sigur Jógvan Jespersen.